# 250 fólk renna í havnargøtum leygardagin

**Størsta rennitiltakið í Føroyum nakrantíð, Atlantic Airways Tórshavn Marathon, verður leygardagin, og fyrireikararnir rokna við ikki færri enn 250 luttakarum**

RENNING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Rigmor N. Arge er favorittur at vinna kappingina hjá kvinnum, tá ið marathon verður runnið í Havn leygardagin*

Bilførarar í høvuðsstaðnum noyðast at hava eitt vakið eyga við rennarum leygardagin, tí tá verður árliga marathon renningin í Havn. Sjálvt rennitiltakið er býtt upp í ymiskar kappingargreinar, og luttakaratalið fer helst upp um tey 250, siga fyrireikararnir.

### Føroyskir favorittar

Í mun til undanfarna ár er talið av útlendskum rennarum í kappingini vaksið munandi. Millum teirra er týskarin, Horst Preisler, sum í Føroyum fer at renna sítt marathon nummar 1275. Preisler er 69 ára gamal, og hann er einasti rennarin í heiminum, sum hevur runnið fleiri enn 1000 marathon kappingar.
Hjá kvinnunum er eisini forkunnug útlendsk vitjan, tí her verður danska Britta Houmann Sørensen við. Hon rann herfyri sítt marathon nummar 100, og hóast hon nærkast teimum 60, er væntandi, at hon kann geva teimum føroysku kvinnuligu rennarunum skarpan gang. Britta Sørensen hevur ikki færri enn 23 ferðir verið niðan fyri tríggjar tímar, tá ið hon hevur runnið marathon.

Favorittarnir í rennikappingini leygardagin eru annars føroyingar. Ein av fyrireikarunum av stóra rennitiltakinum, Robert Vilhelmsen, sum sjálvur hevur luttikið í fleiri slíkum kappingum, og sum eisini verður við leygardagin, sigur, at eftir hansara tykki er Cecil Weihe favorittur til at vinna hjá monnunum, meðan Rigmor N. Arge er favorittur hjá kvinnum. Tó sigur Robert, at bæði Hjalti Gunnarstein og møguliga Sigurð Justinussen kunnu hótta Cecil, meðan danski veteranurin, Britta H. Sørensen, møguligani kann skaka Rigmor, sum leingi hevur verið at kalla einaráðandi hjá kvinnuligu føroysku rennarunum.

### Stórt fyrireikingararbeiði

At skipa fyri einum slíkum tiltaki sum Atlantic Airways Tórshavn Marathon krevur nógva fyrireiking. Robert Vilhelmsen sigur, at nógv tíð er farin til fyrireiking av kappingini, og ein rúgva av fólki eru við í tiltakinum. Hann sigur, at meðan runnið verður leygardagin, verða ikki færri enn 70 hjálparfólk, sum á ein ella annan hátt fara at hjálpa til. Harafturat koma øll tey fólk, ið eitt nú Reyði Krossur, løgreglan og onnur stilla upp við.

At so nógvir rennarar verða úti á vegnum leygardagin, hevur sjálvsagt eisini sína ávirkan á ferðsluna, og fyri at geva rennarunum best møguligu trygdina verður kollafjarðartunnilin stongdur nakrar tímar leygardagin, meðan runnið verður. - Tað er óðamannaverk at lata fólk renna í tunnlinum, meðan bilar koyra framvið, og tí er avgerð tikin um at stongja tunnilin, sigur Robert Vilhelmsen.

Alt fyrireikingararbeiði í sambandi við sjálvt renniøki er gjørt í neyvum samstarvi við bæði løgreglu, landsverk og kommununa í Havn, soleiðis at trygdin er í hásæti, uttan at hetta darvar ferðsluna ov nógv. Av tí at runnið verður á einum rættuliga stórum geografiskum øki, krevur tað eyka nógv av fyrireikarunum, og samstundis krevur tað eisin fleiri hjálparfólk.

### Vaksandi útlendskur áhugi

Sum áðurnevnt tykist áhugin millum útlendingar fyri marathon renningini í Havn verða vaksandi. Útlendska luttakaratalið er vaksið, og Robert Vilhelmsen sigur, at tey, ið varða av kappingini í Havn, støðugt fáa fyrispurningar frá útlendskum liðum, ið ætla sær at luttaka í kappingini eitt av næstu árunum. Hann sigur, væntandi fara útlendingar um ikki so langa tíð at eiga bróðurpartin av luttakarunum í føroysku marathon kappingini.

### Eisini føroyameistarakapping

Atlantic Airways Tórshavn Marathon er ikki bert ein vanlig marathon kapping, tí talan er samstundis um føroyameistarakapping í marathon. Her tykist lítil ivi verða um, at Rigmor N. Arge fer at vinna heiðurin hjá kvinnunum, meðan spenningurin hjá monnunum er eitt sindur størri.
Vinnarin av føroysku marathon kappingini hjá bæði kvinnum og monnum fær ein gávukekk frá Atlantic Airways upp á ein ferðaseðil á rutunetinum hjá Atlantsflog. Megnar vinnarin samstundis at seta nýtt met á rutuni, fær hann ella hon ein gávukekk frá Føroya Sparikassa áljóðandi 2500 krónur.

### Seinasta freist fríggjadagin

Sum áðurnevnt verður ikki einans runnið marathon. Runnið verður eisini hálvt marathon, umframt tvær stuttleika kappingar, har runnið verður ávíkavist 3 og 5,8 kilometrar. Í sambandi við stóra tiltakið verður eisini skipað fyri ymiskum tiltøkum í gongugøtuni, meðan kappingin fer fram.

Higartil hava okkurt um 40 fólk boða frá, at tey ætla sær at luttaka í marathon renningini, meðan eini 20 fólk ætla sær at renna hálvt marathon. Um nakar hevur hug at luttaka í rennikappingini, skulu tey siga frá í seinasta lagi fríggjakvøldið í ítróttarhøllini á Hálsi.




*Nógvir rennarar verða at síggja í havnargøtum leygardagin, tá ið árliga marathon-kappingin verður*



# Misnøgd við Strandferðsluna



*Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun og Sandoyartingmaður, er ikki nøgdur við, at Strandferðslan arbeiðir við fleiri alternativum til sigling um Skopunarfjørð. Hann vil hava ta játtaðu milliónina til ein túr av Gomlurætt hvørt kvøld klokkan 23.15*

*Savnsmynd*

**Sandoyartingmaðurin Gerhard Lognberg er sera vónbrotin av, at Strandfaraskip Landsins ikki hava fingið ein túr um Skopunarfjørð seint á kvøldið**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Sandoyingar eru sera vónbrotnir av, at Teistin ikki er farin at sigla um Skopunarfjørð seint á kvøldi.

– Hóast Løgtingið hevur játtað eina millión eyka til hesa rutuna, við teirri ætlan, at byrjast skuldi tann 1. juni, er einki hent enn, nú vit nærkast álvarsliga august mánaða, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun og løgtingsmaður fyri Sandoynna.

Hann ætlar ikki lata heta fara uttan viðari, sigur hann, og hevur saman við hinum tingmanninum úr oynni, Pálli á Reynatúgvu, fingið í lag fund við Strandfaraskip Landsins um málið. Hesin fuundurin skuldi vera, eftir at Sosialurin var farin til prentingar seinnapartin mánadagin.

Gerhard Lognberg sigur, at tá peningurin varð játtaður Strandferðsluni til ein eykatúr um Skopunarfjørð, varð roknað sum givið, at talan skuldi vera um ein túr av Gomlurætt seint á kvøldi.

Men nú frættist, at hoyringarskriv verður sent út, har ymsir møguleikar verða nevndir.

Ein er, at siglast skal klokkan 20.15 alt árið, ella í øðrum lagi at gera ein túr eftir tilkalling klokkan 22.00.

– Men hetta er ikki tað, vit vilja hava her suðuri, sigur Gerhard Lognberg. Vit vilja hava ein túr klokkan 23.15 hvørt kvøld. Tað er tað einasta, sum munar nakað, sigur hann.

Hann vísir á, at ynski er at fá ein túr, sum ger tað møguligt hjá Sandoyarfólki at brúka tey tilboð, sum eru á »meginlandinum«.

Hesi liggja ofta seint á kvøldi. Og siglir Teistin so seinastu ferð klokkan 20.15, kann hetta ikki nýtast til nakað, tí tá eru eingi tiltøk liðug, sigur hann.
Tað verið seg mentnartiltøk av ymsum slagi, kvøldskúlar ella hvat fólk nú kann ganga til, um tey hava møguleikan at ferðast aftur og fram.

So eru tað fólk, sum eitt nú arbeiða í vaktarskipanum. Vaktirnar skifta ofta klokkan 23.00, og hevði Teistin siglt klokkan 23.15, bar væl til hjá einum, sum fer av vakt klokkan 23.00, at nátt hesum seinasta túrinum, vísir Gerhard Lognberg á.

Hann sigur, at ein grundgeving í móti at leggja ein túr so seint á kvøldi, hevur verið veðurlíkindini um veturin. Tað skal vera so torført at sigla í myrkrinum.

Men hesum tekur hann ikki undir við. Tí um veturin er líka myrkt klokkan 20.15, sum tað er klokkan 23.15. Og manningin á Teistanum veit sera væl, nær líkindi eru at fara um fjørðin. Eisini í myrkri.

– So handan grundgevingin er heilt burturvið, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun og Sandoyartingmaður.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 29, 2004
www.kaupthing.fo

## Friðarligt á lánsbrævamarknaðinum

MARKNAÐARRÁK

Aðru viku á rað, fullu lánsbrævarenturnar og virðið á partabrøvunum. Hóast smáligt hevur verið við búskaparligum lyklatølum úr USA í farnu viku, verða marknaðirnir ávirkaðir av roknskaparkunngerðum og ymsum hendingum.

Av hendingum í farnu viku, sum fingu lánsbrævarentur og partabrøv at lækka, vóru millum annað tíðindir frá fregnarkeldum um, at yvirgangskroppar fyrireika eina stóra yvirgangsatsókn undan amerikanska forsetavalinum í novembur. Hetta fekk oljuprísirnar at hækka aftur og tosað varð aftur um, at OPEC fer at hækkað prísbandið úr núverandi 22-28$ fyri tunnuna. Eisini útlit fyri eini meiri hóvligari gongd í amerikanska prísvøkstrinum, fekk dollarin at vikna mótvegis evruni, pundinum og yenninum.

Hóast talið av teimum, ið søktu arbeiði var tað lægsta í 4 ár, góvu marknaðirnir sær ikki stórvegis far um hesi tíðindi.

Fleiri roknskaparkunngerðir vóru í farnu viku. Yvirskotið hjá General Electric fyri annan ársfjórðing gjørdist hægri enn væntað, meðan fleiri roknskapir hjá millum annað Yahoo, Veritas Software og Talbots vístu verri úrslit enn væntað. Hettar fekk partabrævamarknaðir at falla.

Hóast partabrævamarknaðirnir og lánsbrævarenturnar seinastu tvær vikurnar hava verið undir einum ávísum trýsti, ávirkar hettar ikki forsøgnirnar hjá Kaupthing um, at lánsbræva- og innlánsrenturnar fara at hækka í longra tíðarbilinum nú ein skipað tilgongd við rentuhækkingum er byrjað í USA. Tó vilja roknskaparkunngerðir og lyklatøl framvegis kunna framskunda ella tøla komandi rentuhækkingum hjá amerikanski tjóðbankanum.

Umsetningurin á marknaðunum hevur seinastu vikuna verið lítil orsakað av summarsteðgi. Tí kann væntast, at hendan vikan eisini verður friðarlig. Hesa vikuna verða kunngjørd, úr USA og Evropa, prísvakstrartøl ið møguliga ávirka marknaðirnar. Eisini kunngerða millum annað Intel og Citygroup sínar roknskapir fyri annan ársfjórðing.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,63% | -0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,72% | -0,04% |
| 10 ára lánsbræv | 4,38% | -0,04% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 267,5 | -0,7% |
| OMX, Svøríki | 679,9 | -1,9% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.779,4 | -0,2% |
| S&P 500, USA | 1.112,8 | -1,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,08 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 165,28 | 0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 78,63 | -1,4% |
| Altjóða Vøkstur | 63,54 | -3,8% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 598,14 | -1,2% |
| EUR | 743,53 | 0,0% |
| GBP | 1.115,29 | 0,8% |
| NOK | 87,81 | 0,2% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*

*Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tap ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.*